# Stálgoymslan sum listahøll



*Torbjørn Olsen tykist ivast í, hvørt málningurin nú eisini hongur soleiðis, sum hann skal. Í bakgrundini eru Bárður Jákuppson og Tróndur Patursson til reiðar at geva góð ráð*
*Mynd: Jan Müller*

**Leygardagin lata 12 av »útbrótarunum« í føroyska listaheiminum upp framsýning. Gamla stál- og aluminiumsgoymslan hjá Skipasmiðjuni er karmur um hesa, og sambært listafólkunum sjálvum er talan um ein bygning, sum er framúr væl egnaður til endamálið**

FRAMSÝNING
*Jákup Mørk*

Andrias Andreassen, Hanni Bjartalíð, Zacharias Heinesen, Hansina Iversen, Bárður Jákupsson, Rannvá Pálsdóttir Kunoy, Anker Mortensen, Olivur við Neyst, Marius Olsen, Tórbjørn Olsen, Tróndur Patursson og Bjarni W. Sørensen.

Tað eru nøvnini, sum standa handan heystframsýningina, nú hon leygardagin opnar fyri almenninginum, og hóast klandur og rok millum føroysk listafólk, so fær hesin bólkurin illa verið róptur annað enn elitan í føroyskari list.

## Nýggj perspektiv

Áður hevur heystframsýningin verið ein náttúrligur partur av tí, sum er fyrifarið innan karmarnar hjá Listaskálanum, men í ár verða onnur høli tikin í nýtslu til endamálið. Gamla stál- og aluminiumsgoymslan hjá Skipasmiðjuni í Havn verður nú karmur um tiltakið, og sambært listafólkunum sjálvum er talan um eini høli, sum eru framúr væl egnað til endamálið.

- Hetta gevur nøkur heilt onnur perspektiv í eini listaframsýning, heldur Tróndur Patursson.

- Fyrst og fremst, so eru hølini somikið rúmlig, at verkini síggjast heilt øðrvísi, enn tey gera í eitt nú Skálanum ella í Smiðjuni. Hartil, so eru gamla smiðjuhøllin at kalla rá. Her eru ongar dikkedarir av nøkrum slag, og tí verða tað myndirnar, sum verða tað berandi í øllum, og tað gevur nakað heilt annað, heldur hann.

## Tørvur á nýggjum hølum

Spurdur, hvørt høllin hjá Skipasmiðjuni kanska verður tað forum, sum »útbrótararnir« eisini koma at nýta framyvir, sigur Tróndur, at tað kundi væl hent seg.

- Nú er ikki nakað endaligt avtalað, men vit hava líka sum roynt at lagt tað upp tann vegin. Og kunnu vit semjast um eina avtalu, sum til ber at gjalda seg burturúr, so er tað als ikki óhugsandi.

- Ikki minst, so gevur hetta fleiri aðrar áhugaverdar møguleikar enn júst bara eina vanliga framsýning. Atkomuviðurskiftini við eini stórari lyft, og gólvið, sum er bygt til at bera eini trý tons. Tí kann talan eisini verða um stórar skulpturar við meira, sum verða framsýnd her. Og stóra víddin ger tað eisini gjørligt, at partar av hølunum verða nýttir til ymisk endamál, so sum skeiðvirksemi við meira.

- Og í øllum førum haldi eg, at tað er tørvur á eini slíkari høll her í Havn. Gott nokk hava vit Skálan og Smiðjuna, men sammetir tú við t.d. Reykjavík, so hava tey eini fýra stór høli til slíkt endamál. Tað gevur møguleika fyri fleiri framsýningum og størri fjølbroytni, og tí haldi eg heilt víst, at vit hava tørv á, sigur Tróndur Patursson at enda.

Stál- og aluminiumsgoymslan hjá Skipasmiðjuni er sokallaði grøni bygningurin á Rundini. Inngongd er í suðurendanum av bygninginum.



*Í vikuni hava tey 12 listafólkini, sum standa handan heystframsýningina í ár riggað til í gomlu goymsluni. Her eru átta teirra avmyndað undir strævnu fyrireikingunum*
*Mynd: Jan Müller*


# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**BMW 318TDS 5H**
Árg 1997, Km 146.000. Kr. 125.000.



**OPEL ASTRA 2.0TDI STC**
Árg 2000, Km 116.000. Kr. 115.000



**CITROEN XSARA 2.0HDI 110HK**
Árg 2000, Km 118.000. Kr. 110.000.
Sertilboð uttan bil í býti 90.000.



**AUDU A4 STC. 2,0 AUT.**
Árg 2003, Km 30.000. Kr. 285.000.
Selist fyri kunda.



**HONDA CIVIC 1,4I**
Árg 2001, Km 71.000. Kr. 105.000



**AUDI A6 1,8 AUT. 125 HK**
Árg 1998, Km 49.000. Kr. 170.000.
Selist fyri kunda.



**MAZDA2 1,2 5 HURÐAR**
Árg 2003, Km 22.000. Kr. 115.000.



**HYUNDAI ACCENT 13I 3H**
Árg 2000, Km 71.000. Kr. 75.000.
Sertilboð uttan bil í býti 50.000.



**CITROEN BERLINGO 1,4I VAN**
Árg 2000, Km 30.000. Kr. 80.000
V/Mvg.



**CITROEN XSARA PICASSO 1,6I**
Árg 2004, Km 22.000. Kr. 165.000.
Selist fyri kunda.



**VW NEW BEETLE 2,0 GRØNUR**
Árg 1999, Km 71.000. Kr. 140.000.
Selist fyri kunda.



**CITROEN XANTIA 2,0HDI**
Árg 1999, Km 103.000. Kr 110.000.
Sertilboð uttan bil í býti 90.000.



**MITSUBISHI CARISMA 1,6**
Árg 1996, Km 120.000. Kr 55.000



**CITROEN XSARA 2,0HDI**
Árg 2002, Km 59.000. Kr. 139.000

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
**Ivan Johansen Bilar**

Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo